## Holst kós móti superliguni

Við 3-1 sigri á útivølli ímóti Herfølge hevur Silkeborg um vikuskiftið styrkt um sína støðu í oddastríðnum í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Silkeborg við Christian Lamhauge Holst spældi í gjár ímóti Herfølge, og dysturin var vístur beinleiðis á TV2 Sport. Føroyska íslettið var ikki so stórt í gjár. Christian Lamhauge Holst var á beinkinum, inntil tað restaðu fimm minuttir. Tá føroyski landsliðsspælarin varð skiftur inn, var støðan longu 2-1 til Silkeborg.



## Henrik Larsen uppsagdur

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, fekk í gjár sekkin frá danska 1. deildarfelagnum Lyngby, sum bara hevur fingið eitt stig burtur úr teimum báðum fyrstu umførunum eftir vetrarsteðgin. Lyngby avroknaði við venjaran beinanvegin. Henrik Larsen varð sagdur úr starvi, og Niels Frederiksen, sum síðani í 2006 hevur verið unglingavenjari í felagnum, er nú venjari hjá 1. liði.

## Einki er avgjørt

**Hóast sigurin í gjár, vil Halgir Dahl Olesen ikki staðfesta, at H71 eigur pláss í finaluni. StÍF bíðar komandi leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

– Tað er als ikki avgjørt. Vit skulu vinna seinasta dystin eisini. Vit hava tapt á Skála fyrr í ár, og tað verður ikki ein lættur dystur.

Hvat hevði sigurin í dag at týða fyri teg sum hoyvíking?

– Ikki nógv meira enn tað, at vit vunnu okkum eitt fet nærri finaluni, sigur Halgir Dahl Olesen.

Hoyvíkingar hava fyrr í hesum kappingarárinum tapt tríggjar reisur móti Neistanum. Fjórðu ferð eydnaðist tað, og Halgir Dahl Olesen sigur, at teir ikki høvdu broytt uppleggið.

– Verjan og málverjarnir standa seg sera væl. Neistin rakti heldur ikki dagin, men tað kunnu teir takka okkum fyri. Vit trýstu teir, og vóru væl omaná.

Hvat hevur ein heimavøllur at týða í einum tílíkum dysti?

– Hann hevur nógv at týða. Áskoðararnir stuðlaðu okkum allan vegin, og tað tóktist, sum fjáltur kom á neistamenninar. Ein tøkk skal ljóða til áskoðararnar, sigur Halgir Dahl Olesen, sum staðfestir, at tað hevði verið uppiborið, um H71 kom í finaluna.

## Neistin ikki í finaluna

**Spælandi høvuðsvenjarin hjá Neistanum, Ingi Olsen, staðfestir, at tað neyvan verður til meira enn gull í steypakappingini hetta kappingarárið**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

– Vit kunnu framvegis spæla okkum í finaluna, men tað er lítið sannlíkt. Við liðnum, sum StÍF hevur í dag, spenna teir ikki fót fyri H71. Men vit geva sjálvandi ikki skarvin yvir. Eg vil bara ynskja vestmenningum og hoyvíkingum góða eydnu í finaluni, sigur Ingi Olsen.

– Vit eru ikki nøgdir. Skaðar hava órógvað okkum nógv, men tað stendur ikki til at broyta.

Ræddust tit H71 í dag?

– Tað helt eg ikki frammanundan, men teir fingu okkum sanniliga at síggja ræsluslignar út. H71 megnaði væl at bróta okkara uppspæl, og tá ov nógvir hjá okkum ikki spæla væl, fær tað ikki verið øðrvísi, sigur Ingi Olsen, sum vónar, at teir kunnu læra av mistøkunum.

– Vit hava ofta havt ryggin móti múrinum síðstu tvey árini, og tað tóktist, sum vit kendu okkum væl í leiklutinum. Men tá tú spælir við eld, brennir tú teg fyrr ella seinni. Og tað gjørdu vit í dag. Vit mugu fáa meira stabilitet í okkara úrslit til komandi kappingarár, sigur Ingi Olsen.

Tróndur Kragesteen spældi bara seinastu løtuna av dystinum í gjár, og Ingi Olsen staðfestir, at Tróndur framvegis hevur ein skaða at dragast við.

– Hann hevur verið skaddur síðstu tíðina, og var tískil ikki tøkur hjá okkum. Vit lótu hann spæla ímóti endanum, hóast hann kanska ikki skuldi gjørt tað, sigur Ingi Olsen.

H71-Neistin 32-24 (15-14)

# Stórur sigur fyri Ho



*Eftir ein javnan fyrra hálvleik setti H71 seg á tað mesta í seinna hálvleiki, og bæði í verju og álopi vóru hoyvíkingar betri enn Neistin*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**Størsti ítróttarligi sigurin fyri Hoyvíkina í fleiri ár var veruleiki í gjár, tá H71 spældi seg eitt stórt fet nærri finlauni. Neistin hevði lítið at bjóða upp á í Hoyvíkshøllini**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Nú er eingin ivi. Ung sum gomul standa á síðulinjuni til reiðar at renna inn á vøllin at fagna sínum stjørnum. Dánjal Tórgarð gleðist um málið, hann júst hevur skotið. Á egnari hálvu knýta Danny Syhler og Halgir Dahl Olesen nevarnar og gera eitt ordiligt ýl. Jóhan Hofgaard í málinum tykist ikki trúgva sínum egnu eygum. Flestu hoyvíkingarnir, sum tú finnur í heiminum, koma inn á vøllin við fløggum, trummum og øðrum. Tað er liðugt. Avgjørt. Nú restar ómetaliga lítið í, áðrenn finaluplássið er tryggjað.

Í steypafinaluni fyri góðum tveimum mánaðum síðan vóru millum heitastu nøvnini Ingi Olsen, Finnur Hansson og Áki Mørk. Hesir tríggir garparnir gingu á odda, tá Neistin í seinastu løtu tryggjaði sær enn eitt gullheiðursmerki til stoltu og flottu felagssøguna.

Allir tríggir vistu teir í gjár, at í Hoyvíkshøllini vóru uppsettir mótstøðumenn, sum løgdu líka í teirra tittlar og mál – av tí einføldu orsøk, at Hoyvíkin vil ganga fremst á ítróttarliga økinum.

Tað var sanniliga ein sigur fyri Hoyvíkina, sum Halgir Dahl Olesen, Dánjal Tórgarð, Janus Sørensen, Levi Nybo, Jens á Skipagøtu, Esbern Patursson, Poul Kjartan Dam, Bárður Brimvík og allir hinir gjørdu til veruleika seinnapartin í gjár. Ítróttarliga hevur býarparturin ikki havt nógv at frøast um síðstu árini, men tað setti hondbóltsliðið í Hoyvík sær fyri at broyta. Og í gjár stóðu hoyvíkingar saman.

### Ingi dugir enn

Við teimum gott og væl 500 ýlandi áskoðarum í

## Gullkorn frá síðulinjuni

**Eisini uttan fyri vøllin var kappast í fullari ferð. Áskoðararnir gjørdu sítt til, at spælararnir skuldu tryggja teimum stigini. Sosialurin loddaði dýpið millum áskoðararnar, meðan dysturin var**

*– Eg fái meg ikki at skilja, at eingin steðgar Inga Olsen*
**Neista-fjeppari**

*– Dreingir, hetta skal vinnast fyri Halgir!*
**H71-fjeppari**

*– Eg eri Kyndils-viðhaldsmaður, so sjálvandi ynski eg, at H71 vinnur*
**Kyndils-fjeppari**

*– Farið aftur til høvuðsstaðin, snobbutu havnarmenn!*
**H71-fjeppari**

*– Tá tú ræðist at vera á vøllinum, kanst tú ikki annað enn tapa*
**Neista-fjeppari**